

# Mærsk-stjóri formaður í Dong

**Jan Müller**

15.03.2014 - 10:26

Oljan.fo

Fyrrverandi stjórin í Maersk Oil, Thomas Thune Andersen, verður formaður í orkufelagnum Dong Energy.

Tað var í januar, at Dong Energy kunngjørdi, at Fritz Schur hevði gjørt av at leggja frá sær sum nevndarformaður eftir at hava røkt starvið í næstan tíggju ár. Boðini komu, beint eftir at fíggjarnevndin hjá Fólkatinginum hevði góðkent, at amerikanski íløgubankin Goldman Sachs skuldi seta pening í Dong Energy, sum danski staturin eigur meirilutan av.

Nýggjur nevndarformaður í Dong Energy verður tann 58 ára gamli Thomas Thune Andersen. Hann tók kortini ikki við formansstarvinum, tá felagið helt aðalfund mikudagin, tí fyrst skal hann úr nevndini í bretska orkufelagnum Scottish & Southern Energy, sum framleiðir olju og gass í Bretlandi og Írlandi.

Thomas Thune Andersen er ein kendur maður í donskum vinnulívi. Í 2009 fór hann úr starvinum sum fstjóri í Maersk Oil, eftir at hava arbeitt í AP Møller samtakinum í samfull 32 ár.

Tey seinastu fimm árini hevur hann sitið í ymsum nevndum, eitt nú bretska orkufelagnum SSE.